## Íslendsk mjólk til Evropa

Í Íslandi eins og í øðrum londum kæra bøndur við mjólkineytum seg um, at fóðrið er dýrkað sera nógv í seinastuni, men íslendski forsætisráðharrin heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki hjá teimum íslendsku bøndrunum. Undir einum orðaskifti í Altinginum fyrradagin segði Geir H. Haarde, at eftir hansara tykki hava íslendskar mjólkarvørur góðar møguleikar á evropeiska marknaðinum. Tað ræður bara um at bera seg rætt at, segði forsætisráðharrin.



*Íslendskar mjólkarvørur hava góðar møguleikar í Evropa (Mynd: Vísir)*

## Fleiri íslendingar

Fólkatalið í Íslandi veksur. Tann 1. januar í ár búðu 313.376 fólk í Íslandi ímóti 307.672 eitt ár frammanundan. Sostatt vaks fólkatalið 1,9 prosent í fjør, og tað var heldur minni enn í 2006, tá tað vaks 2,6 prosent. Men tað var eisini metár. Hagtølini vísa, at íslendingar flyta av bygd til høvuðsstaðarøkið at búgva. Í Reykjavík og har á leið vaks fólkatalið 2,4 prosent í fjør. Á Eysturlandinum minkaði tað harafturímóti heili 9,4 prosent.

# ki farvæl



*Heilt síðan byrjan, hevur Frithleif Olsen verið ímyndin av maskinverkstaðnum FJM í Runavík. – Nú er tað upp til okkum at vísa, at virksemið kann førast víðari uttan undangongumannin, segði Eyðfinn Egholm, skipasmiðjustjóri, fríggjadagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

koma at merkja, at virksemið kring landið hongur saman og virkar sum ein eind.

### Góð ynskir

Skipasmiðjustjórin segði seg onga løtu ivast í, at fólk frameftir eisini fara at hoyra navnið á Frithleifi nevnt, hóast hann nú hevur slept lívsverkinum við Fjøruvegin í Runavík.

- Men um hetta verður úr vinnulívinum, politikki – ella úr báðum – veit eg ikki, men einki er at ivast í, at hann framhaldandi verður virkin, har hann kemur at starvast.

Eyðfinn Egholm ynskti at enda Frithleifi Olsen blíðan byr.



*- Eg eri amatørur og vil heldur selja málningarnar fyri ein lægri prís enn at liggja inni við teimum, tí eg havi ikki pláss fyri øllum, sigur lítillátni listamaðurin, rithøvundurin og skiparin, Absalon Absalonsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Uppilagstur skipari á listaframsýning

**Hann hevur siglt sum skipari í meira enn 40 ár, hevur skrivað tríggjar bøkur, og nú letur hann upp sína triðju listaframsýning við 30 listaverkum**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hósdagin klokkan 16 letur vágbingurin, Absalon Absalonsen, upp málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Opið verður hendan fyrsta dagin so leingi, sum fólk kemur. Framsýningin verður opin hvønn dag til og við týsdagin í næstu viku frá klokkan 14-19.

Við á framsýningin hevur listamaðurin 30 málningar, sum allir eru málaðir við akryl. Hetta eru eitt nú landslagsmyndir, bygdaløg, skip og bátar.

Absalon, sum í dag er 68 ára gamal, hevur siglt sum skipari í góð 40 ár, men gavst at sigla fyri hálvum øðrum ári síðan.

Umframt at vera kendur sum skipari, er hann eisini rithøvundur og hevur skrivað tríggjar bøkur, "Hjálp úr neyð" (2004), "Sornhúsfólkini" (2005) og "Jóan Petur hjá Mouritsi" (2006).

### Bjargingar

Absalon hevur fingist við at mála, síðan hann var eini 20 ára gamal. Hann hevur áður málað við oljumáling, men málar nú bara við akryl.

- Síðan eg fyrstu ferð royndi meg við pensli og máling, havi eg altíð málað av og á, men ikki so samanhangandi øll árini.

Millum motivini hjá honum á framsýningini eru tvær bjargingar á havinum, soleiðis sum listamaðurin ímyndar sær, at hesar fóru fram.

- Hin fyrra er ein bjarging út fyri Vágseiði í 1891, tá ið brim knappliga kom, meðan bátarnir vóru á útróðri. Her var tað Kvívíks-Jógvan, sum í deksbátinum Slanguni stóð á odda fyri bjargingini. Allir útróðrarmenninir bjargaðust, men fleiri bátar fórust.

Absalon sigur, at ein søga er um, at menn undir bjargingini spurdu Kvívíks-Jógvan, um teir eisini skuldu bjarga bátunum. Tá skuldi úrmælingurin taka soleiðis til: "Fáið kropparnar á dekkið...".

Hin bjargingin, sum Absalon ímyndar sær á einum málningi, er frá hendingini á Kappanum í 1935, tá ið Kaj Johannesen umborð á Koraliu bjargaði manninginí við Blithsome, ið pápin, Mortan Johannesen, førdi. Eisini her eydnaðist at bjarga allari manningini.

- Hans Pauli Johannesen var ein av manningini, og eg havi sjálvur siglt saman við Hans Paula í eini seks ár. Havi eisini verið saman við øðrum monnum, sum vóru á Kappanum í 1935, tá ið bjargingin fór fram, sigur Absalon.

Ein málningur er eisini av grindadrápi í Vági.

### Eri amatørur

- Øll árini, meðan eg sigldi sum skipari, skrivaði eg av og á í fríløtum, men eg gjørdi einki við at mála. Tað bar ikki so væl til umborð.

Absalon sigur, at hann kennir seg sum amatørur innan málingalist, og hann dylir ikki, at prísirnir á málningunum, sum hann nú fer at sýna fram í Smiðjuni í Lítluvík, eisini eru amatør-prísir, sum hann tekur til.

Listamaðurin hevur havt tvær framsýningar undan hesari, eina á Tvøroyri og eina í Vági.

- Prísirnir liggja úr 1.900 krónum og upp í 3.500 krónur, og størstu málningarnir eru 80x100 sentimetrar. Eg vil heldur selja fyri ein lægri prís enn at liggja inni við teimum, tí eg havi ikki pláss fyri øllum, sigur lítillátni listamaðurin, rithøvundurin og skiparin, Absalon Absalonsen.

Hann hevur selt fleiri málningar á undanfarnu framsýningum, og hann hevur eisini málað nógvar málningar til fólk eftir bíleggingum.